# Fiskivinnunýskipan

Eitt hugsað dømi í tráð við búskaparligar og lívfrøðiligar teoriir og praktiskar royndir

2016





NUMO

# VISJÓN

- Visjónin fyri føroysku fiskivinnuna er, at hon er búskaparliga, umhvørvisliga og lívfrøðiliga burðardygg og skapar mest møguliga virðisøking og menning í Føroyum.

# Fiskiloyvir - teoretiskt grundarlag



- Citat professor Peder Andersen: “Der er to former for regulering, som kan sikre, at det optimale fiskeris indsats og bestand opretholdes, nemlig fangstafgifter eller individuelle fangstkvoter”.
- Citat professor Ragnar Árnason: “ITQs have been introduced in numerous fisheries around the world apparently with generally, even uniformly, good economic results”.
- Royndirnar í nógvum londum eru, at skip eiga at fiska undir frítt umsetiligum kvotum.

# Royndir í Íslandi




NUMO

11/04/2016

# Generellar ásetingar

- TAC og kvotur sum prosentpartur av TAC.
- Kvotur skulu vera frítt umsetiligar.
- Opið føroyskt hav.
- Sterkur brúksrættur knýttur at kvotum.
- Tekniskar reguleringar sum stongdar leiðir og krøv til fiskireiðskap.
- Møguliga ávísar leiðir reserveraðar fyri ávísum reiðskapi fyri at kunna fiska ávís fiskasløg.
- Allur fiskur virkast á føroyskum skipum og virkjum.
- Allir eigarararnir av føroyskum fiskiførum, og sum hava fiskirættindi um hendi, skulu vera heimahoyrandi í Føroyum.

# Eitt opið føroyskt hav

- Fiskiár eru ójøvn á ymsum leiðum, og "góðar fiskitíðir" fella ymist á ymsum leiðum. Tí skulu skipabólkar ikki byrgjast inni til bert at kunna fiska á ávísum leiðum, tvørturímóti skal tað vera møguleiki fyri hjá skipunum at útvega sær veiðimøguleikar alla staðir, har føroyskir myndugleikar hava ræði á fiskirættindum – eitt opið føroyskt hav.

NUMO

11/04/2016

# Tilvirking og landing





- Generelt eiga vit at gera okkum ætlanir fyri, hvussu vit menna framleiðsluvinnuna í Føroyum og herundir matvøruframleiðslu, har fiskavøruframleiðsla er nógv tann mest týðandi parturin.
- Vit liva ikki bert av at klippa hvørjum øðrum. Hava vit ikki eina týðandi framleiðsluvinnu, fara vit ikki í longdini at hava týðandi tænastuvinnur ella gransking innan økir, sum geva avkast til samfelagið.
- Í útgangsstøði verður allur fiskur veiddur úr føroyskum kvotum og fiskidøgum landaður í Føroyum og elva til, at hetta fevnir um alla veiðuna.
- Landsstýrismaðurin kann verða heimilaður at veita undantak frá hesu reglu, um hetta eyðsæð fær óhepnar avleiðingar.

# Útlendskur kapitalur

- Eitt samfelagsligt atlit er, at mest møgulig virðisøking fer fram í Føroyum. Her verður hugsað um víðari tilvirking og sjálvt sølu- og marknaðarføringsarbeiðið umframt menning og gransking innan fiskivinnuna.
- Fyri at røkka hesum máli eigur at verða ásett, at allir eigararnir av føroyskum fiskiførum, og sum hava fiskirættindi um hendi, skulu vera heimahoyrandi í Føroyum.

# Reglur fyri útlendskan ognarskap í nøkrum londum

- Ísland: Upp til 25% í fiskiskipum.
- Noreg: Upp til 40% í fiskiskipum.
- Grønland: Upp til 33% í fiskiskipum - rækjuskip 0%.
- USA: Upp til 25% í fiskiskipum.
- Føroyar: Upp til 1/3 í fiskiskipum.

NUMO

11/04/2016

# Gransking og førleikamenning

- Gransking og førleikamenning eru avgerandi, tá ið góðska og kappingarføri í fiskivinnuni skulu styrkjast og økjast. Umframt ta menning, sum einstaka fyritøkan stendur fyri, er umráðandi at eisini landið nýtir neyðugu orkuna til gransking og menning innan fiskivinnu. Fyri at tryggja, at granskingin hevur við sær ætlaða úrslitið, eiga fiskivinnan og tað almenna í felag at leggja granskingina til rættis, eins og hesi í felag eiga at gera av, hvørji átøksøkini eru.

# Útlutan av fiskiloyvum

- Søla.
- Sambært søguligum rættindum.
- Onnur atlit.
- Avmarkingar av ognarparti.

# Avmarkingar í ognarparti - Føroyar

| | |
|---|---|
| Bólkur 2: Trolarar | 20% av fiskidøgunum |
| Bólkur 3: Línuskip | 20% av fiskidøgunum |
| Bólkur A og 4B: Ú y 15t | 20% av fiskidøgunum |
| Bólkur 4T: Ú y 40 t á tr v | 30% av fiskidøgunum |
| Bólkur 6: Garnabátar | 25% av fiskiloyvunum |
| Verksmiðjutrolarar | 35% av kvotuni í toskavirði |
| Ídnaðarskip | 35% av veiðiloyvunum |
| Uppisjóvarfiskiskapur | 25% av veiðiloyvunum |

# AVMARKINGAR Í OGNARPARTI - ÍSLAND

| | |
|---|---|
| Toskur | 12% av fiskaslagnum |
| Hýsa | 20% - |
| Upsi | 20% - |
| Svartkalvi | 20% - |
| Sild | 20% - |
| Makrelur | 20% |
| Lodna | 20% - |
| Rækjur | 20% - |
| Kongafiskur | 35% - |
| Fyritøkur | 12% - av kvotunum tils. |
| Smábátar | 5% |

NUMO

# Gjald/ressourcerenta





- Avgjald fyri fiskirættindi skal fremja effektivitet og optimalt samfelagsligt avkast av fiskivinnuni.

- Umráðandi er, gjøldini verða løgd í fastar karmar, og at vinnan verður tikin við uppá ráð, tá eftirlitið og gjaldið verður lagt tilrættis og ásett.

# Gjald/ressourcerenta

- Gjald fyri fiskirættindi verður grundað á:
  - Seinasta roknskapartilfar/mettan kapitalkostnað fyri einstøku veiði bólkarnar.
  - Veiðimøguleikar og mettar prísir komandi ár.
  - At partafelagsskattur og gjald fyri fiskirættindi gevur einum miðalskipi í viðkomnadi veiðibólki ávíst avkast.

- Gjald ásett á hendan hátt fremur effektivitet og optimalt samfelagsligt avkast av fiskivinnuni.

# Tilfeingisgjøld

Skattur:

- 2011 – 7,8 mió kr
- 2012 – 5,2 mió kr
- 2013 – 18,2 mió kr herav frá fiskivinnuni 2,2 mió kr

Gjøld:

- 2011 – 88 mió kr herav frá uppboðssølu 72 mió kr
- 2012 – 65 mió kr
- 2013 – 140 mió kr
- 2014 – 126 mió kr

# Dømi um loyvisgjald - Pelagisk skip

| ÁR 1 | Makrelur | Sild | Annað | Tils. | Prosent |
|---|---|---|---|---|---|
| Veiða, tons | 88.000 | 46.000 | | | |
| Prísur, kr pr kg | 6,65 | 5,55 | | | |
| Søluvirði, tkr | 585.200 | 255.300 | 250.000 | 1.090.500 | |
| Kostnaður, tkr | | | | -380.000 | |
| Starvsf.kostn., tkr | | | 29% | -316.245 | |
| Avskrivingar, tkr | | | | -100.000 | |
| Fíggjarkostnaður, tkr | | | | -50.000 | |
| **Úrslit áðrenn gjald, tkr** | | | | **244.255** | **100%** |
| Gjald, kr pr kg | 0,75 | 0,35 | | | |
| Gjald tilsamans, tkr | 66.000 | 16.100 | | (82.100) | |
| Reiðarapartur, tkr | 46.860 | 11.431 | 71% | 58.291 | 24% |
| **Úrslit áðrenn skatt, tkr** | | | | **185.964** | |
| Pf skattur, tkr | | | 18% | 33.474 | 14% |
| **Ársúrslit, tkr** | | | | **152.490** | |

NUMO

11/04/2016

# Dømi um loyvisgjald - Pelagisk skip

| ÁR 3 | Makrelur | Sild | Annað | Tils. | Prosent |
|---|---|---|---|---|---|
| Veiða, tons | 95.000 | 45.000 | | | |
| Prísur, kr pr kg | 8,00 | 4,00 | | | |
| Søluvirði, tkr | 760.000 | 180.000 | 330.000 | 1.270.000 | |
| Kostnaður, tkr | | | | -380.000 | |
| Starvsf.kostn., tkr | | | 29 % | -368.300 | |
| Avskrivingar, tkr | | | | -100.000 | |
| Fíggjarkostnaður, tkr | | | | -50.000 | |
| **Úrslit áðrenn gjald, tkr** | | | | **371.700** | **100%** |
| Gjald, kr pr kg | 0,95 | 0,40 | | | |
| Gjald tilsamans, tkr | 90.250 | 18.000 | | *(108.250)* | |
| Reiðarapartur, tkr | 64.078 | 12.780 | 71 % | 76.858 | 21% |
| **Úrslit áðrenn skatt, tkr** | | | | **294.843** | |
| Pf skattur, tkr | | | 18 % | 53.072 | 14% |
| **Ársúrslit, tkr** | | | | **241.771** | |

# Dømi um loyvisgjald - Pelagisk skip

| ÁR 3 | Makrelur | Sild | Tilsamans | Prosent |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn gjald** | | | **371.700 tkr** | **100%** |
| | | | | |
| Gjald kr pr kg | 0,95 | 0,40 | | |
| Gjald tilsamans | 90.250 tkr | 18.000 tkr | 108.250 tkr | 29% |
| Pf skattur | | | 53.072 tkr | 14% |

NUMO

11/04/2016

# Gjøld Ísland Føroyar

| | |
|---|---|
| Ísland: | |
| Veiðuvirði 2013 | 153 mia ískr |
| Gjald 2013 | 10 mia ískr |
| Gjald 2013 | 6,5 % |
| | |
| Føroyar: | |
| Veiðuvirði 2013 | 2.132 mió kr |
| Gjald 2013 | 140 mió kr |
| Gjald 2013 | 6,6 % |

NUMO

# Úrslit áðrenn óvanligt – Skipabólkar




NUMO

# Úrslit áðrenn óvanligt – Allur veiðiflotin





# Tilfeingisskattur

- Tilfeingisskattur hevur tann fyrmun fyri vinnuna, at onki verður goldið, uttan vinningur er.
- Heldur ikki virkar skatturin forðandi fyri virksemi, eins og avgjøld gera tað.
- Tilfeingisskattur er lagaligari fyri inneffektiv reiðari enn loyvisgjøld.

# Uppboðssøla

NUMO

11/04/2016

- Uppboðssøla av varandi fiskiloyvum.
- Uppboðssøla av stuttvarandi fiskiloyvum.
- Útlendskur/føroyskur eigaraskapur.

# Samanbering av modellum

| | Verandi | Uppboðssøla | Arnason |
|---|---|---|---|
| **Umsetiligheit** | 2 | 5 | 5 |
| **Stabilitetur** | 2 | 0 | 5 |
| Sterkur brúksrættur | 2 | 1 | 5 |
| Opið føroyskt hav | 2 | 5 | 5 |
| Gjøgnumskygni kvotur | 2 | 4 | 4 |
| Gjøgnumskygni prísur fyri kvotur | 2 | 5 | 2 |
| Forða strámannavirksemi | 4 | 3 | 5 |
| **Fremja avleitt virksemi** | 3 | 1 | 5 |
| **Fremja íløgur í tilknýttar vinnur** | 3 | 1 | 5 |
| Minka atgongdsforðingar fyri føroyingar | 3 | 2 | 5 |
| **Tryggja veiðuna á føroyskum hondum** | 3 | 1 | 5 |
| Tryggja virking á føroyskum skipum/virkjum | 3 | 1 | 5 |
| Menning og gransking | 3 | 1 | 5 |
| Tryggja treytir hjá manningini | 3 | 1 | 5 |
| **Vinningur av avgjaldi stutt sikt** | 2 | 5 | 2 |
| **Vinningur av avgjaldi langt sikt** | 4 | 3 | 5 |
| **Størri samfelagskøka** | 3 | 1 | 5 |
| **Tilsamans** | **44** | **40** | **77** |
| | | | |
| **Miðal stig** | **2,7** | **2,4** | **4,6** |

**5 = Setningur verður væl rokkin**

**0 = Setningur verður als ikki rokkin**

# Modellið samanumtikið

- Støðugir og effektivitetsfremjandi karmar.
- Størst mogulig virðisøking.
- Sum hevur við sær størst moguliga inntøku til landskassan uppá longri sikt.
- Møguleiki hjá nýggjum aktørum.

## NIÐURSTØÐA

- Skipið fyri stabilum kørmum innan fiskivinnuna.
- Skipið fyri einum opnum føroyskum havi.
- Skipið fyri sterkum brúksrætti í fiskivinnuni.
- Skipið fyri einum gjaldi, sum fremur effektivitet og loyvir kapitaldannilsi.
- Skipið fyri at veiðitólini vera á føroyskum hondum.
- Berið skjótt at.

# Kveikjarafundur

- Nýskipan við denti á støðugar karmar og virðisøking.

NUMO

# Fiskivinnunýskipan

Eitt hugsað dømi í tráð við búskaparligar og lívfrøðiligar teoriir og praktiskar royndir tillagað arbeiðssetningin hjá nevndini at gera tilmæli um nýggja fiskivinnuskipan eftir 2018

2016

# Málsetningarr hjá nevnd at gera tilmæli um nýggja fiskivinnuskipan eftir 2018





- At øll føroyska fiskivinnan verður skipað undir tryggum og haldførum lógarkørmum, fyrisiting og skipanum.
- At livandi tilfeingið í føroyskum sjógvi og tey rættindi Føroyar eiga í altjóða sjógvi og hava samrátt seg til við onnur lond, eru ogn Føroya fólks og eru varandi grundarlag undir føroyska búskapinum og vælferðini hjá tjóðini.
- At Føroyar skulu gerast undangonguland at umsita allar fiskastovnar burðardygt – bæði í egnum sjógvi og í altjóða samstarvi – og at hava fremstu vitan og gransking um fiskastovnar og vistfrøðiligu skipanirnar í havinum.
- At tilfeingið er tryggjað sum ogn hjá fólkinum, og at rættindini at troyta tað eru á føroyskum hondum.
- At til ber at skapa mest møguligan virðisvøkstur og avkast í Føroyum av fiskatilfeinginum til reiðarí, manningar, virkir, fyritøkur, starvsfólk, tænastuveitarar og samfelagið alt, og at vit støðugt menna nýskapan og føroyskar førleikar í øllum pørtum av virðisskapanini.

# Málsetningarr hjá nevnd at gera tilmæli um nýggja fiskivinnuskipan eftir 2018





- At tilfeingisrentan gerst so optimal sum gjørligt, og at størst møguligur partur av tilfeingisrentuni fellur til landið.
- At til ber at virka í eini marknaðargrundaðari fiskivinnu við vinnuligum frælsi undir jøvnum kappingartreytum.
- At vinnumøguleikar ikki savnast á fáum hondum, men at somu rættindi eru at bjóða seg fram at reka vinnu, og grundarlag er fyri fjølbroyttum virksemi, nýskapan og menning kring landið.
- At Føroyar støðugt menna sín leiklut og sína ábyrgd í altjóða samstarvi og avtalum um fiskiskap og fiskivinnu – og tryggja sín rættvísa part av rættindunum til felags og ferðandi fiskastovnar, umframt at samráða seg til skilagóðar avtalur við onnur lond um møguleikar og atgongd at fiska hvør hjá øðrum.

# ÚTLUTAN AV FISKILOYVUM UM KEYPSSKÁLA

- Hetta verður selt um keypsskálan har landið er formelli keyparin og seljarin.

  - Tann parturin av fiskiloyvunum sum er omanfyri, hvat hvør í mesta lagi kann eiga av TAC fyri einstøku fiskasløgini.

  - Nýggj fiskirættindi.

  - Fiskiloyvir hjá teimum sum noyðast at gevast ella ynskja at selja part av ella øll síni fiskirættindi.

# Almennur keypsskáli

- Endamálið við at selja fiskirættindini um keypsskála er:
  - Gjøgnumskygni fyri handil við fiskirættindum.
  - Ein annarleiðis marknaðargrundað útlutan og handil við fiskirættindum enn frítt umsetiligar kvotur.
  - Landið stendur fyri keypi og sølu av fiskirættindum.
  - Møguleiki verður fyri skatting av sølu av fiskirættindum í serligum førum.

# Uppboðssøla av rávøru

- Allur fiskur skal um føroyskan kajkant og bjóðast út í Føroyum antin
  - Beinleiðis til føroysk fiskavirkir
  - Ella um almenna uppboðssølu

- Ásett verður at ein ávísur partur av veiðuni skal landast um almenna uppboðssølu.

# Skipan fyri útróðrarflotan

- Partur av TAC fyri einstøku fiskasløgini á føroysku landleiðini verður reserveraður útróðrarbátum undir ávísa stødd at veiða á vanligu leiðunum hjá hesum førunum.
- Skipanin annars kann vera ein kvotuskipan sum lýst frammanfyri ella einhvør onnur skipan, sum passar til hendan partin av flotanum, ið ikki skal virka á opna føroyska havinum.

# Samanbering av modellum

| | Verandi | Keypsskáli | Arnason |
|---|---|---|---|
| **Umsetiligheit** | 2 | 5 | 5 |
| **Stabilitetur** | 2 | 1 | 5 |
| Sterkur brúksrættur | 2 | 0 | 5 |
| Opið føroyskt hav | 2 | 5 | 5 |
| Gjøgnumskygni kvotur | 2 | 5 | 5 |
| Gjøgnumskygni prísur fyri kvotur | 2 | 5 | 5 |
| Forða strámannavirksemi | 3 | 5 | 5 |
| **Fremja avleitt virksemi** | 3 | 2 | 5 |
| **Fremja íløgur í tilknýttar vinnur** | 3 | 2 | 5 |
| Minka atgongdsforðingar fyri føroyingar | 3 | 5 | 5 |
| **Tryggja veiðuna á føroyskum hondum** | 3 | 5 | 5 |
| Tryggja virking á føroyskum skipum/virkjum | 3 | 5 | 5 |
| Menning og gransking | 3 | 2 | 5 |
| Tryggja treytir hjá manningini | 3 | 5 | 5 |
| **Vinningur av avgjaldi stutt sikt** | 2 | 2 | 3 |
| **Vinningur av avgjaldi langt sikt** | 4 | 1 | 5 |
| **Størri virðisøking/samfelagskøka** | 3 | 1 | 5 |
| **Tilsamans** | **45** | **56** | **83** |
| | | | |
| **Miðal stig** | **2,6** | **3,3** | **4,9** |

**5 = Setningur verður væl rokkin**

**0 = Setningur verður als ikki rokkin**